## Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

Røktar- og Umlættingarheimið Láargarður lýsir eftir ítrivsvegleiðara ella heilsuatstøðingi við serligum áhuga fyri aktivering av búfólki og dagstovnsfólki.

Arbeiðsuppgávurnar eru ymiskar og fjølbroyttar í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkaranum og eru bæði í Dagsstovninum og inni í búeindunum.

Krøv til umsøkjaran annars: Tú skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og skalt hava góð samstarvsevni og nýhugsan er kærkomin.

Demensskiparaútbúgving hevði eisini verið ein stórur fyrimunur.

Starvið er avloysarastarv, fulla tíð fyribils í eitt ár frá 1. oktober 2005 til 1. oktober 2006.

Lønin er sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Almanna- og heilsurøktarafelagið.

Umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast til leiðaran fyri Lágargarð, Stoffalág 84, Box 1188, Tórshavn.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 316788 og spyrja eftir leiðandi ergoterapeuti Tórun Guttesen.

**Umsóknarfreistin er tann 21. september 2005**

# Leiðari
## til dagrøktarskipanirnar í Hvannasundi og á Viðareiði

Hvannasunds- og Viðareiðis Kommuna søkja eftir leiðara fulla tíð til dagrøktarskipanirnar í báðum kommununum.

Umsøkjarin skal hava námsfrøðisliga útbúgving sambært løgtingslóg nr. 65 frá 10.05.2000.

Starvið verður sett frá 1. oktober 2005.

Løn sambært sáttmála ímillum Pedagogfelag Føroya og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum vera at senda til:

**Hvannasunds Kommunu**
**FO-740 Hvannasund**

í seinasta lagi 20. september 2005.

Meira fæst at vita frá núverandi leiðara á tlf. +298 211341 ella við at venda sær til kommunurnar.

| **Hvannasunds Kommuna** | **Viðareiðis Kommuna** |
|---|---|
| FO-740 Hvannasund | FO-750 Viðareiði |
| Tlf. +298 452007 | Tlf. +298 451083 |
| Fax +298 452007 | Fax +298 451094 |
| t-post: hvanna@olivant.post.fo | vid.kommuna-kallnet.fo |

Dagrøktarskipanin á Viðareiði hevur 8 ár á baki, og er í dag nomineraað til 30 børn, 5 dagrøktarar eru í skipanini. Skipanin hevur eina spælistovu við spæliøki rundanum, har dagrøktarar og børn kunnu koma saman.

Skipanin í Hvannasunds Kommunu er nominerað til 30 børn. 5 dagrøktarar eru í skipanini. Skipanin í Hvannasundi hevur nýggja spælistovu við øki rundanum til frama fyri dagrøktarar og børnini í skipanini.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3398**, P/F Frá 1. juli 2002, 100 Tórshavn.
**Nevnd:** Farin úr nevndini: Toni Reinard Dam, Skotarók 3, 110 Tórshavn (nevndarlimur)
Brandur Í Dali, Torkilsgøta 4, 188 Hoyvík (nevndarformaður)
Innkomin sum **nevndarformaður:** Petur Olsen, Yviri við Strond 85, 100 Tórshavn
**Innkomin í nevndina:** Kartni Sejer Olsen, Tjarnarlág 17, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Kára Gunna Óladóttir, J. Broncksgøta 48, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
**Stjórn:** Farin frá sum stjóri: Toni Reinard Dam, Skotarók 3, 110 Tórshavn
**Farin frá sum stjóri:** Petur Olsen, Yviri við Strond 85, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:** Havgrímur Johannesen, Jónas Broncksgøta 48, 100 Tórshavn
**Grannskoðari:** Farin frá sum grannskoðari: Sp/f SPEKT, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn
Nýggjur grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn

*Skráseting Føroya*
*tann 05. september 2005*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1927, P/F Hotel Føroyar, 100 Tórshavn.
**Kapitalur:** Viðtikið tann 30.06.2005 at lækka partapeningin við kr. 6.000.000,00 til kr. 2.000.000,00 til kurs 100 til útgjaldingar til partaeigarar, eftir at proklama er runnið.
**Viðtøkur broyttar:** 30.06.2005
**Nevnd:** Farin úr nevndini: Zakaris Óli Andrias Martin Hammer, Marknagilsvegur 38, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Heðin Klæmint Weihe, Marknagilsvegur 64, 100 Tórshavn (næstformaður)
Jens Kári Vilhelm, Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík (nevndarlimur)
Farin frá sum **nevndarformaður:** Jóannes á Váli, Undir Kerjum 2, 100 Tórshavn
Innkomin sum næstformaður: Jóannes á Váli, Undir Kerjum 2, 100 Tórshavn
**Innkomin í nevndina:** Jan Sigvart Walle, Rangviksvigen 6B, 3212 Sandefjord (nevndarformaður)
Thomas Magnussen, P. við Steinsgøta 24, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Kristian Edvard Heen, Skákið 9, 100 Tórshavn (nevndarlimur)

*Skráseting Føroya*
*tann 05. september 2005*

*Kristin Balle*

# Ítrivsvegleiðari til eldrasambýlið á Skála

Søkt verður eftir ítrivsvegleiðara til búfólkini á Eldrasambýlinum á Skála

Arbeiðið hjá ítrivsvegleiðaranum er, við støði í áhuganum og førleikanum hjá búfólkunum, skipað fyri stimbrandi aktivitetum saman við búfólkum og starvsfólki.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna og er tíðaravmarkað frá 15. september til 31. desember 2005. Møguleiki er fyri, at starvið heldur áfram komandi ár.

Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast Runavíkar kommunu í seinasta lagi mánadagin 12. september 2005.

**Runavíkar kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

# Lærari til Tofta skúla

Fyri lærara í sjúkra- og barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv frá 19. september 2005 til 18. apríl 2006 (7 mðr.).

Talan er um starv við 16 undirvísingartímum og umfatar:

- hondarbeiði í 3 og 4. fl
- heimkunnleiki í 4 og 5 fl.
- evning í 3. og 5. fl.
- kristni í 8 fl.
- serligur tørvur

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. september 2005.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at tosa við skúlastjóran, telf. 447332.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4031**
**Navn:** Sp/f Ví-con
**Adressa:** 900 Vágur
**Kommuna:** Vágs
**Stovningardato:** 01-09-2005
**Viðtøkudato:** 01-09-2005
Stovnarar: Vígdis Hansen, 900 Vágur
**Stjórn:** Vígdis Hansen, 900 Vágur, (stjóri)
**Grannskoðari:** Sp/f ADS-grannskoðan v/ Bjarne Nielsen, 826 Trongisvágur
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 2.740,00 til kurs 100 og kr. 77.260,00 í øðrum viðrum til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handverk, handil og annað yrki í hesum sambandi.
Roknskaparár: 01.10 - 30.09
**Fyrsta roknskaparár:** 01.09.2005 - 30.09.2006

*Skráseting Føroya*
*tann 05. september 2005*

*Kristin Balle*





Lesið Sosialin